# Stendur á jøvnum í fullveldismálinum

*Seinasta veljarakanningin, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Sjónvarpið vísir, at tað nú stendur á jøvnum í spurninginum um fullveldið. Samstundis vísir kanningin, at meirilutin av veljarunum heldur, at tað ber til at finna eina nýggja skipan innanfyri ríkisfelagsskapin*

Sveinur Tróndarson

Tað stendur á jøvnum í spurninginum um fullveldið. Tað vísir ein veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Sjónvarpið.

Kanningin vísir, at knappliga 46 prosent taka undir við, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldi, eftir leistinum, sum samgongan arbeiðir eftir, meðan knappliga 45 prosent av veljarunum eru ímóti. Góð níggju prosent av veljarunum hava enn ikki tikið støðu.

**Meira kjøt á**

John Mortensen, sum hevur staðið fyri at gera veljarakanningina metir orsøkina til undirtøkuna vera at fólk nú veit meira um hvat býr í uppskotinum hjá samgonguni.

– Fyri einum góðum ári síðani var ein veljarakanning gjørd, har spurt varð um fullveldi, men tá tóku bara 27 prosent undir við tí uppskotinum, sigur hann.

Nú er hetta talið hækkað til knappliga 46 prosent.

– Til dømis tað, at vit framhaldandi skulu hava felags kong er viðvirkandi til, at fólk taka undir við fullveldismálinum nú meiri enn fyrr.

**Búskapurin ávirkar**

Annars er John ivaleysur í, at búskaparliga støðan í Føroyum hevur stóra ávirkan á undirtøkuna fyri fullveldismálinum.

– Í 1993 varð gjørd ein kanning, sum vísti, at bara tíggju prosent tóku undir við loysing, sum tað tá varð kallað og tá vóru fólk bangin um at vit ikki fóru at klára okkum, sigur John Mortensen.

Nú er búskaparliga støðan í Føroyum munandi batnað og tað ávirkar eisini viljan hjá føroyinginum at taka undir við uppskotinum hjá landsstýrinum, heldur John.

– Tað síggja vit eisini, um vit hyggja at hvussu fólk svara upp á spurningin um ríkisveitingina. Har stendur eisini á jøvnum. Umleið helmingurin heldur, at ríkisveitingin við tíðini eigur at vera tikin burtur, sigur John Mortensen.

**Onnur skipan**

Ein onnur áhugaverd niðurstøða í veljarakanningini er, at meiri enn helmingurin av teimum spurdu halda, at tað ber til, at gera eina nýggja skipan innanfyri ríkisfelagsskapin.

Her er nakað, sum bendir á, at Javnaðarflokkurin hevur verið heppin við sínum taktikki.

Flokkurin heldur fast við, at teir ikki vilja úr ríkisfelagsskapinum og at teir heldur vilja hava eina nýggja skipan innanfyri ríkisfelagsskapin.

Knappliga 54 prosent av teimum spurdu siga, at tey halda at tað ber til, meðan góð 32 prosent ikki vænta at tað ber til.

Og hetta heldur John eisini verða orsøkina til stóru framgongdina hjá Javnaðarflokkinum í sjálvari veljarakanningini, sum er viðgjørd aðrastaðni í blaðnum.

**Fleiri vilja leggja rygg til**

Eisini vórðu veljararnir spurdir um tey væntað, at burturfallið av ríkisveitingini fer at hava við sær fall í livistøðinum.

Upp á henda spurning svaraði sjeyndi hvør, at tað mettu tey.

Tað, sum fyri samgonguna er áhugavert í hesum føri er, at næstan fjórði hvør vil leggja rygg til eitt fall í livistøðinum.

– Tað er lutfalsliga nógv og sera áhugavert, sigur John Mortensen.

– Hóast tað enn er meiriluti, sum ikki góðtekur, at livistøðið lækkar, so gerast tey, sum vilja leggja rygg til falli alsamt fleiri, leggur John afturat.

John sigur, at tað sum efit øllum at døma liggur aftanfyri er nokk tað, at fólk vænta at livistøðið bara fellur fyribils.

– Eg kann hugsa mær, at fólk vilja góðtaka eitt fyribils fall, men tey rokna ikki við, at fallið verður varandi. Tey rokna við, at tað sum verður mist í fyrsta umfari, kemur aftur seinni.

**Samráðingarúrslitið flytir atkvøður**

Í dag verður so hol sett á samráðingarnar. Mannsterkir eru føroyingar farnir til samráðingar og um alt gongur, sum landsstýrið ætlar, so skal eitt úrslit vera greitt áðrenn summarfrítíðina.

Vit spurdu John, um hann væntar, at eitt »gott« samráðingarúrslit fer at flyta atkvøður til fullveldi, ella um tað ikki fer at ávirka.

– Ganga samráðingarnar væl og eitt nú skiftistíðin verður lagalig, so er ikki óhugsandi, at fleiri fara at taka undir við uppskotinum hjá samgonguni. Sum eg segði í áðni, so hevur búskapurin sera nógv at siga í hesum málinum og tí vænti eg, at ein long skiftistíð fer at geva størri undirtøku, sigur John Mortensen.




*Sum støðan er í løtuni, so taka fleiri undir við ætlanini hjá samgonguni um fullveldi enn tað eru ímóti. Men munurin er bara eitt prosent. Tá spurt verður um fólk halda at tað ber til at gera eina nýggja skipan innanfyri ríkisfelagsskapin, er nógv størri munur. Tá siga 54 prosent, at tey halda at tað ber til, meðan 32 meta, at tað ikki ber til.*

**Grafikkur: Sosialurin**

# – Nøgdir við Javnaðarflokkin

*Veljarakanningin vísir, at framferðarhátturin hjá Javnaðarflokkinum er góðtikin av veljarunum, meðan Fólkaflokkurin verður revsaður fyri m. a. ikki at vera greiður í sínari talu, heldur John Mortensen frá Fynd*

Sveinur Tródnarson

Javnaðarflokkurin fær herðaklappini meðan Fólkaflokkurin fær ein dyggan undir vangan. Javnaðarflokkurin fær tveir tingmenn afturat, meðan Fólkaflokkurin stendur til at missa tríggjar.

So greið er niðurstøðan í veljarakanningin, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Sjónvarpið.

Sambært veljarakanningin hevði Fólkaflokkurin verið tann heilt stóri taparin um val var í dag, meðan Javnaðarflokkurin hevði verið tann heilt greiði vinnarin.

**Ógreið tala**

John Mortensen frá Fynd, heldur orsøkina til at veljarin revsar Fólkaflokkin vera, at teir eru ógreiðir í síni talu.

– Anfinn Kallsberg tekur fult undir við fullveldismálinum, men lurta vit eftir Bjarna Djurholm og Óla Breckmann so eru teir meira ullintir í tí teir siga. Teir tosa nógv um búskap í sambandi við fullveldi og tað kann verða ein orsøk til, at veljararnir eru rýmdir, sigur John Mortensen.

Ein onnur orsøk kann vera, at Fólkaflokkurin hevur tosað nógv um skattalætta síðani samgongan kom fram at, men har er einki hent.

– Eg skal ikki siga, at tað er orsøkin, men tað er ikki óhugsandi, at tað er viðvirkandi til stóru afturgongdina, sigur John.

Kortini leggur hann afturat, at Fólkaflokkurin altíð stendur seg illa í veljarakanningum, men tá val er, stendur kortini ikki so illa til.

**Virkin í andstøðu**

Stóri vinnarin er Javnaðarflokkurin. Her heldur John Mortensen at tað eru fleiri orsøkir. Millum annað hevur Javnaðarflokkurin verið aktivur í fullveldismálinum og tað tykist, sum veljararnir hava lyndið til at taka undir við honum.

– Harafturat hava teir verið sera aktivir í andstøðuni, eins og Sambandsflokkurin, sum eisini hevur stóra framgongd, og tað trúgvi hevur sína stóru ávirkan á framgongdina, sigur John Mortensen.

Hann vísir á, at báðir flokkarnir hava gjrøt nógv burtur úr at leggja uppskot fyri tingið og hóast hesi uppskot ikki hava fingið undirtøku í tinginum, so geva veljararnir flokkunum báðum herðaklapp fyri sítt arbeiði.

– Harafturat hevur Jóannes Eidesgaard markerað seg nógv í fullveldismálinum og tað hevur sína heilt greiðu ávirkan, sigur John Mortensen.

Tá tað um Sambandsflokkin ræður heldur hann, at tað serliga er tann virkni andstøðupolitikkurin, sum er orsøkin til, at flokkurin hevur so stóra framgond.

**Heldur tørn**

Størsti flokkurin til seinasta val var Tjóðveldisflokkurin og hóast flokkurin sambært veljarakanningini ikki verður størstur, so fær hann kortini eina framgongd.

– Hon er ikki so stór, men tað er kortini ein framgongd. Tað er kanska løgið, tá havt verður í huga tað, sum flokkurin hevur verið ígjøgnum í seinastuni, serliga tá hugsað verður um rúsdrekkatrupulleikarnar. Hugsa vit so um, at flokkurin annars ikki hevur fingið so nógv onnur av sínum málum ígjøgnum, so er tað enn meira undrunarvert, at teir halda tørn, sigur John Mortensen.

Hann vísir samstundis á, at Tjóðveldisflokkurin í fleiri førum beinleiðis hevur verið noyddur at bakka, og kortini sæst tað ikki aftur í kanningini. Sum dømi nevnir hann fiskivinnumál og landsverkfrøðingin.

– Men frágreiðingin kann vera, at veljararnir flokkast um tað eina málið - fullveldismálið, tí her er flokkurin púra greiður. Tað er ikki óhugsandi, at veljararnir halda seg til flokkin av teirri orsøk, at nú hendir nakað í tí málinum og tí eru teir trúðfastir, sigur John Mortensen.

Viðvíkandi smærru flokkunum vil hann ikki siga stórvegis, tí statistiska óvissan ger, at tað er torført at úttala seg um teirra støðu sambært veljarakanningini, sigur hann.

| | Val, apríl '98 | Kanning mars 00 | Í mun til seinasta val |
|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 21,3 | 16,1 | -5,2 |
| Sambandsflokkurin | 18,0 | 21,9 | 3,9 |
| Javnaðarflokkurin | 21,9 | 27,3 | 5,4 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 7,7 | 6,0 | -1,7 |
| Tjóðveldisflokkurin | 23,8 | 24,4 | 0,6 |
| Miðflokkurin | 4,1 | 4,3 | 0,2 |
| Kr. Fólkaflokkurin | 2,5 | - | - |
| Verkamannafylkingin | 0,7 | - | - |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | |




